

*Høvdingar hittast – Eyðun Viderø og Magni Laksáfoss. Báðir hava síni sjónarmið um ein komandi Sandoyartunnil, annar fyri og hin ímóti. Men báðir skilja teir hvønn annan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# - Eg skilji teg

Eitt av heitu evnunum í summar hevur verið ætlanin um ein undirsjóvartunnil undir Skopunarfjørð.

Ymiskar meiningar hava verið førdar fram í miðlum, løgtingi og í kjaki fyri og ímóti eini slíkari ætlan.

Eitt er í øllum førum púra greitt:

**FYRI** hesi ætlanini er Eyðun Viderø, fyrrverandi tingmaður á Sandi. Aftanfyri seg hevur hann ivaleyst øll hini 1392 fólkini á Sandoynni.

**ÍMÓTI** at fremja ætlanina beint nú er Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og helst mong onnur við honum á hinum 16 bygdu oyggjunum.

Sosialurin setti teimum báðum stevnu ein vakran heystardag í farnu viku. Evnið var Sandoyartunnilin, og staðið var hugnaliga stovan hjá Eyðuni heima á Sandi.

Orðaskiftið teirra millum vísti greitt, at teir hava hvør síni sjónarmið í hesum máli. Men eitt eru teir í øllum førum felags um:

**TEIR SKILJA HVØNN ANNAN!**

## Flyta úr bygd til býin

Ein partur av trupulleikanum í Sandoynni er at tað unga fólkið flytur burtur og kemur ikki aftur. Hetta er fíggjarmálaráðharrin fult greiður um.

- Henda støðan er ikki bert galdandi fyri tykkum í Sandoynni. Langt frá tí. Hetta sama ger seg galdandi á nógvum øðrum støðum í Føroyum, greiðir Magni frá.

Hann vísir til hagtølini sum siga, at eitthvørt øki bert megnar at halda fast við 70-80% av fólkinum - t.v.s. at fyri hvørji 1000 fødd børn flyta millum 2 og 300 teirra úr økinum og koma ikki aftur.

- Tú behøvist bara at hyggja eftir øllum teimum sum vórðu fødd her í 1970 til dømis. Hvussu nógv av hesum búgva framvegis her?

- Tað er bara so, Eyðun, at summi øki missa gott fólk, tí tey flyta úr bygdunum og inn í býirnar. Vit síggja tað í øðrum londum og vit síggja tað sama í Føroyum, tí tiltrekningskraftin í Havn er so stór.

Henda gongdin er ikki einans treytað av samferðsluni, men av bygnaðinum í økinum og teimum fortreytum sum hetta virkar undir. Ein sær haraftrat at fólkatalið í Havn er ikki vaksið tey seinastu fýra árini og at fólkatalið minkar í ávísum býarpørtum.

- Tað eru tí ikki bert tunlar og pengar, sum gera at øki og býir minka. Spurningurin er altíð, hvørji størv og hvørji tilboð og ítriv eru til fólkið í økinum.

- Satt at siga, Eyðun, so hevur tú púra rætt í tí, tá tú spyrt, um nakað er at gera hjá einum professara í Sandoynni?

### FAKTA

**Eyðun Viderø, Sandur**

Føddur í 1942, og hevur sitið sum umboð fyri fólkaflokkin á tingi í samanlagt 12 ár. Fyrstu ferð á ting í 1979 sum varamaður hjá Demmusi Hentze.

Hevur sitið í bygdaráðunum í Skálavík og á Sandi, og eisini verið formaður.

**Magni Laksáfoss, Streymnes**

Føddur í 1969 og er útbúgving cand. polit. Limur í Búskaparráðnum.

Tók í mai mánaði við starvinum sum fíggjarmálaráðharri, og hevur bæði fíggjarmál og búskaparmál undir sær.